# fólki úr skipavinnuni



*Fullsett var á áhoyraraplássinum í løgtinginum í morgun, tá lógin um vinnuligan fiskiskap var til fyrstu viðgerð. Flestu áhoyrarar umboða manningarfeløg, reiðarar og skipavinnuna annars*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Ein álvarsamur formaður í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- At mæla til eina skerjing av fiskidøgunum hjá línuflotanum upp á 50% er tað sama sum at krevja, at øll alment lønt í Føroyum fara niður í hálva tíð, segði Jákup Mikkelsen.

Heini O. Heinesen, sum var seinastur at hava orðið í hesuum umfari, segði, at tað neyvan slepst undan skerjingum, nú fiskastovnar eru so illa fyri.

- Gera vit einki, fer fiskiflotin av knóranum kortini, helt hann fyri.

Jóhan Dahl var næstu framsøgumaðurin, og hann helt fyri, at veiðiorkan hevur verið marginalpunktið íkjakinum um fiskivinnumál seinastu árini.

Hann segði seg slett ikki taka undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum um søguliga stóru skerjingarnar av fiskidøgum.

Løgtingsmaðurin fýltist eisini á, at landsstýrismaðurin púra blankt hevur valt at fylgja tilmælinum hjá Fiskirannsóknarstovuni og slett ikki hevur tikið við í sítt uppskot tað arbeiði, sum fiskiorkunevndin og fiskidaganevndin hava gjørt.

Jóhan Dahl segði, at Føroyar eru tað land í heiminum, sum hevur nógv flest stongdar leiðir fyri trolveiði og segði, at heili 41% av landgrunninum er stongdur fyri trolveiði.

- Verða dagarnir hjá húkaflotanum skerdir við 50% og partrolaraflotin skerdur í fiskidøgum við 20%, verður lítið eftir at fiskiflotanum komandi ár.

Løgtingsmaður Sambandsfloksins vísti eitt nú á tað, sum fiskidaganevndin sigur um kanningar av hjáveiðini hjá pelagisku skipunum, bæði teimum útlendsku og føroysku skipunum.

- Tað eru nógv áhugaverd ting í tilmælinum hjá fiskidaganevndini og ikki minst hetta um hjáveiðina hjá hesum skipum, men alt hetta hevur landsstýrismaðurin valt at feiða av borðinum, sum Jóhan Dahl tók til.

Hann segði, at hesi stóru pelagisku skipini fiska eitt nú í kantinum á landgrunninum, har partrolararnir fiska.

- Hvør sigur, at ikki upsi og toskur svimur uppi í svartkjafti og gulllaksi? spurdi hann.

Jóhan Dahl helt fyri, at ætlan landsstýrisins helst er, at Føroyar skulu hava einar 4-5 stórar flakatrolarar á landgrunninum og so nøkur onnur skip aftrat.

- Eg haldi, at landsstýrið eigur at melda greitt út, hvør ætlanin við hesum uppskoti er, eins og við teimum viðmerkingum, sum vóru í løgmansrøðuni á ólavsøku.

Í hesum sambandi vísti hann eitt nú á ætlaninar um broytingar í minstaforvinnginum hjá útróðrarmonnum.

Løgtingsmaðurin fýltist eisini á, at Fiskirannsóknarstovan, sum fær 20 miljónir krónur um árið at arbeiða við, ikki dagførur sítt exelrokniark, sum hann tók til, og kann hava meiri dokumenterað tilmæli og tøl at vísa á í sínari ráðgeving.

- Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, hevur sjálvur sagt, at nógv er broytt, síðan stovnurin læt landsstýrismanninum sítt tilmæli.

Jóhan Dahl vísti eisini á ta togan, sum áður hevur verið millum Kjartan Hoydal og Fiskirannsóknarstovuna um dygdina í ráðgevingini.

- Eg eri samdur í, at neyðugt er við ávísum skerjingum, og í aðrar mátar tillagar støðan, sum í fiskiskipavinnuni í løtuni, nakað.

Løgtingsmaðurin helt tað vera skeivt av landsstýrismanninum at mæla til friðingar á Føroyabanka, sum eru djúpari vatni, har eitt nú gulllaksaskipini royna, tí royndin á hesum leiðum ávirkar ikki toskin á bankanum.

- Nú málið kemur í vinnunevndina til viðgerðar, ivist eg onga løtu í, at hetta verður eitt heilt annað uppskot, tá viðgerðin í nevndini er liðug, segði Jóhan Dahl.

Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum helt, at ráðgevingin slett ikki er í samsvar við fiskidagaskipanina, sum Kjartan Hoydal eisini hevur víst á.